

## Løgreglan steðgaði ikki Jól í Svingi

Fyrr í vikuni prentaðu vit grein, har yvirskriftin ljóðaði at »Politiið steðgaði Jólunum í Svinginum«. Av hesum kundi tað ljóða sum, at tað var løgreglan, ið steðgaði jólakalendaranum, sum Kringvarp Føroya hevur føroyskað úr norskum, men tað var also ikki løgreglan, ið var orsøkin til seinkingina.
Orsøkin til at løgreglan varð íblandað er tann, at løgreglan gjørdi sína skyldu og steðgaði persóninum, ið skuldi syrgja fyri at jólakalendarin varð endursendur, fyri álvarsligt brot á ferðslulógina. Tískil varð viðkomandi seinkaður somikið nógv, at jólakalendarin ikki varð sendur sambært skránni.

# Ársins Átak gjørdist ársins mistak

**Í 2006 varð blaðið Vinnuvitan heiðrað sum Ársins Átak á Vinnudegnum. Bert góð tvey ár seinni varð lykilin snaraður um. Vinnuvitan fall fyri tí fyrsta, kalda fíggjarliga lotinum og gjørdist ársins mistak í 2008, skrivar Business-Line**

KOLLSIGLING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Vinnuvitin lýsir reytt! Soleiðis ljóðaði yvirskriftin á einum tíðindastubba á heimasíðuni hjá Business-Line seinasta summar.

»Ein týðandi táttur í Vinnuvitan vóru sokallaðu roknskaparlýsingarnar, har gongdin hjá fyritøkum varð umrødd. Blaðið smæddist ikki fyri at geva bæði rós og rís til leiðslurnar, alt eftir hvussu væl/illa tær dugdu at reka sínar fyritøkur«, skrivar Business-Line.

Víðari skrivar heimasíðan hjá Business-Line:

»Tí hildu vit, at søgan um blóðreyðu fíggjarligu úrslitini hjá P/F Vinnuvitan, ið bar boð um, at fyritøkan bløddi út, hevði uppiborið eitt heiðurspláss í føroysku miðlunum seinasta summar. Søgan um vánaliga úrslitið hjá Vinnuvitan var seinni lýst í Vinnuvitan, har blaðið sjálvt oysti av síni vinnuligu vitan og greiddi góðtrúnum føroyskum vinnulívsfólki frá, hví tey á Vinnuvitan ikki dugdu at reka egna fyritøku, men høvdu nógva vitan um, hvat leiðslurnar í øðrum fyritøkum gjørdu skeivt ella beint«.

Og Business-Line heldur fram:

»Við milliónaundirskotinum hjá blaðnum í 2007 í huga, skuldi meira enn vanligt bjartskygni til at halda, at hesin vinnuligi "vitin" hevði nakra framtíð fyri sær, men stóð við síni himmalrópandi blóðreyðu ávaringarglæmu, um at fella saman og detta út av eggini. Á vinnudegum 2006 varð Vinnuvitan kosið "Ársins átak". Ársins hetta og hatta hava tað við sær, at tey eru tengd at rákinum, ið ger seg galdandi í tíðini. Talan er um óbundið, flótandi, persónligt og ofta partískt hugtak, tí talan ikki er um ein veruligan vinnara, ið hevur skjalprógvað sínar førleikar, ið ger hann betri enn egnaðan til heiðurin, fram um annan", skrivar Business-Line.«

Heimasíðan vísir á, at Business-line og Børsen gera tað øðrvísi.

»Vit heiðra Gazellurnar, ella tær fyritøkurnar, ið við roknskapum í hondini tey seinastu fýra árini kunnu skalprógva, at tær vaksa skjótast av øllum og standa fyri nærum øllum búskaparligum vøkstri og skapan av nýggjum arbeiðsplásum. Tað er tí størri heiður at kunna prýða seg við heitinum "Gazellu-vinnari" ella "Gazellufyritøka", heldur enn Ársins eitt ella annað. Tað er søgan um Vinnuvitan eitt sera gott dømi um«, endar greinin á Busines-Line, www.bl.fo.

Við í fallinum fór Vikublaðið, sum Vinnuvitan átti, tá Dimmalætting keypti bæði bløðini. Fyrrverandi starvsfólk arbeiða í løtuni við at fáa Vikublaðið givið útaftur.



*Meðan enn alt var gleði og gleimur á Vinnuvitan. Á vinnudegnum í 2006 varð blaðið heiðrað sum Ársins Átak. Tað vóru tó ikki brøðurnir Olsen, Magni og Óli á Deild Olsen (myndin), ið tóku skrædlið. Tað gjørdi harafturímóti Dimmalætting, tá blaðið fyri bara fyri hálvum ári síðani gjørdi av at keypa Vinnuvitan, fyri síðani at snara lykilin um longu 8. desember*

# Handlar venda Visa Elektron bakið

**Eftir øllum at døma er talið av handlum, ið nokta at taka móti Visa Elektron vaksandi. Skipanin er dýrari enn við vanligum kredittkortum, og upp til eina mánaði gongur, áðrenn peningurin er á kontuni**

GJALDSKORT
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Síðani føroyingar fyrstu ferð fingu møguleikan fyri at fáa sær eitt Visa Elektron gjaldskort, eru túsindavís av kortum av hesum slagnum givin út. Serliga eru tað ung fólk, ið hava tikið




hesi kortini til sín, og eru tey blivin rættiliga væl umtókt millum ung.

Samstundis hava handlarnir eisini frætt seg yvir hesa gongdina, og hava teir eisini gjørt íløgur í at kunna taka ímóti øllum hesum nýggju kortunum.

Men nú vendir eftir øllum at døma í holuni. Tað eru nevnliga fleiri og fleiri handlar og fyritøkur, ið venda sær frá at taka móti Visa Elektron. Heilt einfalt nokta handlarnir at taka ímóti hesum kortslagnum.

Orsøkin er í høvuðsheitum tann, at skipanin fyri Visa Elektron er dýrari at nýta, enn til onnur gjaldskort, og at peningurin verður útgoldin til seljaran næstan ein heilan mánað eftir at keypið er farið fram, vil seljarin ikki hava eyka útreiðslur av keypinum.

### Dýr avtala

Tá handlar ella fyritøkur vilja fáa sær møguleikan fyri at taka móti Visa Elektron ella øðrum gjaldskortum, verður avtala gjørd beinleiðis við PBS í Danmark. PBS tekur sær eisini av pengaflytingunum, ið verða gjørdar, og tekur sjálvandi eitt ómaksgjald til sín sjálvs eisini.

Men hetta er eftir øllum at døma ein rættiliga dýr avtala fyri handlarnar í Føroyum.

Á heimasíðuni hjá PBS framgongur nevnliga, at fyri hvørt keypið, ið verður framt, tekur PBS heilt upp til 3,75 prosent av upphæddini, ið flytast skal.

Afturat hesum hava teir ein standardpakka, ið inniber at peningurin verður fluttur á kontuna hjá handlinum ella fyritøkuni 28 dagar eftir at keypið er framt. Ynskir handilin at fáa peningin fluttan skjótari enn tað, bjóða teir handlinum ein betri pakka, har flytingin verður gjørd átta dagar eftir keypið. Men tað kostar so eisini eitt prosent afturat keypinum. Sostatt kann PBS krevja heilt upp til 4,75 prosent av gjaldsupphæddini.

### Takka nei til Visa Elektron

Tað eru eftir øllum at døma fleiri, ið longu nú hava takkað nei til Visa Elektron, ella hava ætlair um at gera tað í nærmastu framtíð.

Petur Splidt, stjóri í Auto, greiddi í gjár fyri Sosialinum, at tað vindur meira og meira upp á seg, at hýruvognsførararnir nokta at taka móti Visa Elektron.

Hans Andreasen, stjóri í Glitnir, sannar eisini at tað er ein dýr skipan at taka móti Visa Elektron, og tá tey nú ikki kunnu nýtast um næturnar, meðan teir hava flestu kundarnar, ásannar hann at teir mest líkt fara at melda seg frá skipanini við Visa Elektron.

- Tað kann hugsast at vit venda okkum frá Visa Elektron. Tað er jú einki vunnið, um øll venda sær frá kortunum, greiðir Hans Andreasen, stjóri í Glitnir, frá.

## Rætting

Í gjár skrivaði undirritaði upp til fleiri ferðir at Gunnar Nolsøe var deildarstjóri hjá Eik í Suðurstreymoy. Hetta er tó ikki rætt, og er tað Øssur Nolsøe, ið er deildarstjóri hjá Eik í Suðurstreymoy. Vit biðja orsaka mistakið.

**- rn**